COVID-19 | CORONA

# REINFØRI Á ARBEIÐSPLÁSSINUM

## VASKIKLÁRT

Verð við til at gera tað lætt at halda arbeiðsplássið reint. Hetta kann millum annað gerast við at hava skriviborðið ruddiligt, tá tú fert frá arbeiðsplássinum.

## FELAGS NÝTSLUFLATA

Tað, sum vit øll nerta við á arbeiðsplássinum, má haldast reint. Hetta veri seg hurðahandtak, ljóskontaktir, vaskikranar, kaffimaskinur og prentarar. Hetta er eisini galdandi fyri útgerð, sum verður nýtt av fleiri starvsfólkum, t.d. høvuðsett og knappaborð.

## BYRJA VIÐ REINFØRI

Vaska tínar hendur ella nýt hondspritt, tá tú kemur til arbeiðis. Hondspritt skal innihalda í minsta lagi 70% alkohol.

## ONGANTÍÐ OV OFTA

Har tað er møguligt verður viðmælt at vaska oftari enn vanligt og at raðfesta reingerð av yvirflatum.

## MINST TIL TELEFONINA

Verður ein telefon nýtt av fleiri starvsfólkum verður viðmælt annaðhvørt at spritta ella at taka eftir henni við einum vaskiklúti.

## VASKA ARBEIÐSSTØÐ

Vaska tína arbeiðsstøð við spritti, vaskiklúti ella vanligum vaskievnum eftir loknan arbeiðsdag.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

Les meiri á www.corona.fo og www.arb.fo.